





# Alt til bilin hjá Mekonomen




**Mekonomen Billutir við Hoyvíksvegin hevur alt til bilin og er ein av størstu veitarum til bileigarar og bilbransjuna sum heild.**

Navnið Mekonomen er sett saman av orðunum mekanikari og økonomi. Konseptið er bygt soleiðis upp, at har er alt at fáa til bilin. Umframt goymslu við eykalutum er talan um ein stóran handil, sum er uppbygdur eins og aðrir handlar hjá Mekonomen í Norðurlondum.

Alt frá hillasystemum og skeltum til eitt stórt vøruúrval við øllum tí sum Mekonomen stendur fyri.

Handilin er kundvinarligur og hugnaligur. Alt er sett upp soleiðis, at tað er lætt hjá kundanum at hava yvirlit yvir handilin. Har er alt til bilin og til verkstaðið.

Sjálvsagdir lutir í einum slíkum handli eru t.d. spegl, lyktir, radioútgerð og øll sløg av hond- og elektriskum amboðum. Til børnini eru t.d. barnastólar og nógv ymiskt annað til børn at spæla við, eins og alt til hundin sum t.d. hundaboksir og hundaskálir. Til røkt av bilum er ein hópur av vaskievni og poleringsevnum umframt t.d. perur, viskarbløð og mottur. Til bilverkstaðin hevur Mekonomen alt frá skiftilyklum til testarar og innrætting av einum heilum verkstaði.

Mekonomen Billutir hevur spesialiserað seg í eykalutum til bilar, so sum plátulutir, útstoyt, lyktir og annars allar slitlutir - bæði brúktar og nýggjar. Mekonomen gevur 3-ára garanti upp á nýggjar eykalutir.

Í hesum døgum tá servicestøðirnar ikki longur hava so nógv til bilin, er tað er helst kærkomið hjá fólki at hava møguleika at koma inn í ein handil, ið hevur alt til bilin, sigur Petur Martin Johansen, stjóri í Mekonomen Billutir, sum leggur afturat, at handilin er á tremur við góðum tilboðum og jólagávuhugskotum.